SKIPAN AV GRINDADRÁPI Í HAVN

Grindaboð

Týdningarmikið er, at sýslumaðurin, snarskivan, grindaformenninir, álitisgrindamenninir o.o. fáa grindaboðini sum skjótast, soleiðis at drápið kann verða so væl skipað sum til ber.

Tá sýslumaðurin fær grindaboðini, boðar hann í arbeiðstíð snarskivuni frá og aftaná arbeiðstíð sløkkiliðsstøðini frá, og syrgja tey fyri, at boðini verða givin víðari sum skjótast um Globi-skipanina til grindaformenn o.o. sambært listanum "Grindaboð", sum liggur á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

Fyrireiking á sandinum

Grindaformaður á sandinum stílar, saman við álitisgrindamonnum og sløkkiliðsmonnum, fyri girðing, ***sí skjal I,*** og at fólk halda seg uttan fyri hesa og ansar eftir, at kvirt er á sandinum og gevur boð um, nær tíð er at fara oman á sandin at skera á háls.
Endi við refleksum verður spentur fram við landinum undir sjúkrahúsinum har steinar liggja.

Nakrir av álitisgrindamonnunum eru í froskmannabúna og hjálpa til við at seta á hvalir, tá sleipað verður.

Grindaformenn:
Óli Joensen
Hanus Højgard
Magnus H. Magnussen
Torlakkur Hansen

Tiltaksgrindaformenn:
Jógvan á Argjaboga
Jákup Andreas Mohr

Álitisgrindamenn á sandinum:
Andreas Joensen
Andrias Sigurstein
Annfinn Norðfoss
Anfinnur Thorsteinsson
Beinur Poulsen
Benny Tórsheim
Bjarni Thomsen
Bjørn Hansen
Bogi Wardum
Erlind Magnussen
Eyðfinn Guttesen
Finnur Sørensen
Gullberg Gullfoss
Gunnvaldur Lützen
Hallgrím Joensen
Hans Clementsen
Hans J. Hermansen
Hans Vilhelm Lützen
Hákon Poulsen

Hørdur Wardum
Ivan Holm
Jákup Jacobsen
Jóannes Patursson
Jógvan Hendrik Sigurstein
Jóhann Eysturoy
Jónleif Sólsker
Kemm Poulsen
Kristian Bærentsen
Mads Guttesen
Magni Petersen
Óla Jákup Guttesen
Páll Jarnfoss
Petur Eyðun Dam
Petur Jákup Sigurstein
Salomon Jacobsen
Símun Joensen
Sjúrður Hansen
Sjúrður Holm
Tommy Hansen
Torfinn Hentze
Trygve Samuelsen
Jógvan Andras Joensen
Jørleif Kúrberg
Karin Jacobsen
Jógvan Olsen

Grindafólkið skal akta boð teirra.

Álitisgrindamenninir skipa alla tíðina fyri at læra nýggjar og ungar grindamenn upp og leggja teimum lag á at fara hóvliga fram og royna at nýta sóknarongulin sum minst.

Ferðslan

Politiið ansar eftir, at ferðslan kann ganga sum hon skal fyrst og fremst eftir hospitalsvegnum, men eisini eftir øðrum vegum har um leið, har fólk seta bilar frá sær og/ella steðga á at hyggja.

Grindarakstur

Fyri ikki at pøsa grindina, og fyri at grindin skal vera so góður matur, sum vit jú ynskja, er umráðandi ikki at reka hana ov harðliga. Týdningarmikið fyri drápið er at spekja grindina við so spakiligum og hóvligum rakstri sum til ber og bert at brúka ekkolodd, astikk o.a. eftir boðum frá grindaformonnunum, men annars eiga allir grindabátar at hava fastakast.

Grindin kemur til drepning

Eins og fyriskrivað í 10. grein í grindakunngerðini er tað sýslumaðurin, saman við grindaformonnunum, sum hoyra hvalvágni til, ið skulu stíla fyri nær og hvar grindin skal verða hildin til, og hvussu fram skal verða farið við drápinum.

Formannsbátarnir skulu hava flagg uppi og rópara.

Grindin eigur, sambært gomlum siði, at ***verða løgd still***, áðrenn hildið verður til. Skal ferð fáast á grindina, er neyðugt at leggja hana stilla á passandi dýpi uttan fyri eina linju millum ***Argjahøvda og Eystara mola*** helst uttan fyri grótkastið á Argjum.

Meðan grindin liggur***, sí skjal II***, skipa bátar seg eftir boðum frá grindaformonnunum. Teir størru bátarnir og skipini, sum eru hóskilig til sleiping, skulu tá liggja uttast og forða og annars útinna boðini, ið givin verða, ***sí skjal III***, og tí ræður um at lurta eftir boðum á ***kanal 8*** ella gjøgnum rópara.

Bátar, sum koma, aftan á at grindin er løgd still, skulu ansa eftir ikki at órógva grindina. Liggur grindin innarliga, skulu hesir bátar halda seg innan fyri eina linju millum molan og ískaiina. Teir kunnu so koma uppí, tá grindin verður hildin til.

Eingin bátur ella skip má fara inn um formannsbátarnar, uttan at tað er álagt av grindaformanni.

Tá ***menn á sandinum eru klárir***, halda formannsbátarnir grindini til. Eingin grindabátur má tá vera so nær formannsbátunum, at hesir ikki óhindraðir kunna snara í bæði borð og harvið óhindraðir halda grindini til.

Mint verður á, at ikki er loyvt at høgga og skera á háls úr báti, fyrr enn grinda-formenninir hava givið boð, og at hesi boð ikki skulu gevast, fyrr enn eingi útlit eru fyri, at grindamenninir á sandinum fáa hendur á hvalirnar.

Brot móti boðum og forboðum koma undir bót vísandi til 27. grein.

Teir bátar, ið bróta boð frá grindaformonnunum ella sýslumanninum, og sum fáa skaða av teirri orsøk, skulu ikki rokna við at fáa endurgjald fyri skaða.

Drápið

Grindaformaður stílar, saman við sýslumanninum, fyri drápinum.

Frammanfyristandandi reglur eru galdandi, fyri at sjálvt drápið skal fara fram so siðiliga og ruddiliga sum til ber, og at grindin fæst so langt ***upp á turt*** sum til ber, og at menn á sandinum eru væl skipaðir, so at drápið verður pínuleyst, og grindin verður góður matur, sum vit jú ynskja.

Tá grindin er komin á land, ella so nær landi, at hvalirnir liggja fastir, fara grinda-menninir, undir leiðslu av og eftir boðum frá grindaformanni, í holt við drápið.

Álitismenninir á sandinum hava sóknaronglar/blásturkrókar við **sissal** ella **manilla** línu. Grindaformaðurin ansar eftir, at eingin brúkar neilonlínu, ið, sum vitandi er, kann vera ógvuliga skaðilig.

Høgt eigur at verða sum minst, har til ber eiga menn at royna ***nýggja ongulin,*** í staðin fyri at høgga, mett verður, at ***ikki*** er rætt at hála hvalirnar ov langt uppá turt, áðrenn teir verða dripnir, tí meira sett verður á endan, longri etur sóknarongulin seg inn í kjøtið og pínir hvalin. Tað er tí umráðandi, at teir, ið stíla fyri á sandinum, skipa fyri hóvligari uppháling.

Tilmeldingin á sandinum

Grindamenn á sandinum melda seg til hjá uppskrivarum, sum eru í vesti við áskrift “uppskrivari”.

Fyri at vissa seg um, at ein er skrivaður upp, verða grindamenn bidnir um at stilla seg uppí rød við uppskrivararnar.

Alt fyri eitt tilmeldingin er liðug, skulu uppskrivararnir, uttan drál, flýggja sýslumanninum listarnar til drápspart. Tá uppskrivingin er um at vera liðug, eigur ein av uppskrivarunum at fara til sýslumannin við listum fyri at fáa gongd á skrivingina og fyri at medvirka til, at seðlarnir kunnu koma skjótt út.

Uppskrivararnir hjálpa skrivifólkunum at lesa nøvnini.

Sleip

Grindaformenninir biðja sum vant egnaðar bátar taka sær av sleipi, men knípir við luttøku, verður álagt bátum at sleipa, áðrenn teir verða skrivaðir upp.

Fyri at fáa bátarnar skjótt út aftur frá kaiini, eru stroppar klárir, tá tikið verður ímóti hvalunum. Flaki liggur við kaiina, har menn hjálpa at taka ímóti.

Hivast má ikki við togi ella neilonendum.

Fráboðan av grindaskaða

Grindaskaði á bát, t.e. skaði á bát, sum ***eftir boðum frá grindaformanni hevur tikið lut í sjálvum drápinum***, skal fráboðast grindaformanni beinan vegin, drápið er av, og bátar hava útinnt tað, ið sýslumaður og/ella grindaformenn hava givið boð um, men ***innan uppskriving av bátum***.

Skaðasýnismaðurin sýnir skaðan sum skjótast.

Skaði á landi skal somuleiðis fráboðast skaðasýnismanninum. Boð um skaða á landi kunnu eisini latast grindaformanni. Skaðasýnismaðurin er altíð at hitta á býráðsskrivstovuni hálvan tíma, áðrenn seðlarnir koma út.

Tilmelding av bátum

Tilmeldingin fer fram umborð á Pressaranum ella øðrum egnaðum báti, sum liggur við vestaru boyuna uttan fyri oljutangarnar. Eru líkindini ikki til vildar, liggur hann á øðrum hóskandi plássi longri inni.

Tilmeldingin byrjar eftir boðum frá grindaformonnunum. Tilmeldað verður við bæði borð, bátarnir skulu tí koma í tveimum røðum vestanífrá.

3 mans, sum eru í vesti við áskrift “uppskrivari” skriva upp.

Bátar verða uppskrivaðir við havnakenningarmerki, navni, bátastødd, bátaánara og tali av grindamonnum. Í grindareglugerðini § 3, stk. 3, stendur “Bátur, sum fer í grind, skal vera merktur við havnakenningartekni”. Bátur uttan havnakenningartekin skal venda sær til sýslumannin.

Tá tilmeldingin er liðug, skulu uppskrivararnir uttan drál flýggja sýslumanninum listarnar til drápspart og medvirka til, at seðlarnir koma skjótt út.

Uppskrivararnir hjálpa skrivifólkunum at lesa bátanumrini/bátanøvnini.

Vakt, uppfisking og skipan av kaiøki o.a.

Grindaformaður setir vaktarmenn/hjálparfólk, sum eru í vesti við áskrift “hjálparfólk”, tá tað sæst, at grindin er komin í Sandagerði.

Av trygdar- og reinførisávum sperra vaktarmenninir av fyri óviðkomandi, spula, áðrenn hvalirnir verða heysaðir og spula av og á, meðan koyrt verður við trukkunum.

Hvalirnir eiga ikki at leggjast ov tætt.

Vaktarmenninir opna allar hvalirnar, so teir ikki spillast. Eru stundir til tess, taka teir innanúr, so hvalirnir kølna skjótari, og grindin verður so góður matur sum til ber.

Merking

Grindaformaður stílar fyri merking í raðfylgju og skundar undir hana sum mest, um neyðugt við eyka fólki.

Umráðandi er at flýggja sýslumanninum seðlarnar sum skjótast.

Seðlar

Seðlarnir koma út hjá Magn á Vestaru Bryggju.

Mai2009
Sýslumaðurin/Tórshavnar kommuna